# Skuggamyndir

## Ingun Christensen, 2015

https://nam.mitcfu.dk/CFUFH1690012015




**Lýsing:**

Hugsa tær at sita í einum bussi, har øll hava sína egnu søgu!

Í hesum níggju stuttsøgunum, ið hava støði í okkara gerandisdegi og samtíð, letur høvundurin fólk siga sína søgu, soleiðis at vit sum lesarar hóma skuggamyndirnar aftan fyri tey. Søgurnar flættast inn í hvørja aðra og vísa, at vit so ella so hava ávirkan hvør á annan.

**Lærugrein og stig:**

Føroyskt á A-stigi (1. árið) ella C-stigi. Við smáum tillagingum kann tilfarið eisini brúkast í hádeild fólkaskúlans.

**Faklig øki**

Við hesum tilfarinum kunnu næmingarnir menna førleikarnar at greina og tulka stuttsøgur og at seta í frásjón. Somuleiðis menna tey førleikarnar at samstarva, leggja fram og at skriva ymisk tekstsløg.

**Tilfar:**

Arbeitt verður við bókini *Skuggamyndir* (77 s.). Harafturat eru leinki til ymiskt annað tilfar.

**Arbeiðshættir:**

Floksundirvísing, bólkaarbeiði og einsæris arbeiði.

**Tíð:**

5-7 blokkar á 90 min.

© Nám 2023

## Byrja at lesa (1 blokkur)

Lurtið í felag eftir brotinum “Góð debut” (40 min.) úr sendingini *Mentanarcaféin* hjá Kringvarpi Føroya, 2. desembur 2015.

Kannið síðan bókina *Skuggamyndir*:

- Hyggið eftir permuni.
- Lesið tekstirnar á baksíðuni og á klaffunum.
- Lesið heilsanina til Aleksandur og innihaldsyvirlitið.

Tosið saman í flokkinum um, hvørjar væntanir tit hava av bókini.

Síðan byrja tit at lesa bókina *Skuggamyndir* í flokkinum og lesa so restina hvør sær heima. Í flokkinum kunnu tit antin lesa hvør sær ella saman í smáum bólkum. Veljið tykkum ein av teimum níggju persónunum í bókini at fylgja, meðan tit lesa. Minnist at skriva viðkomandi viðmerkingar og síðutøl niður.

Persónarnir í bókini:

- Tann ungi drongurin
- Kvinnan í reyða regnfrakkanum
- Maðurin við yvirskegginum
- Myrkhærda gentan
- Tann brúnoygdi
- Konan við blástrinum
- Kvinnan við barnavogninum
- Ungi maðurin við keppinum
- Gráhærdi maðurin

## Orðaskifti og bólkaarbeiði (1 blokkur)

Fyrra helvt av blokkinum er orðaskifti í bólkum. Tit skulu í smáum bólkum tosa saman um bókina. Tit kunnu m.a. tosa um hesar spurningar:

- Hvat dámdi tykkum bókina?
- Lýsir hon viðkomandi evni?
- Er hon realistisk?
- Hvat halda tit um persónarnar?
- Eru tit samd/ósamd við tí, sum Vár í Ólavsstovu segði um bókina í sendingini *Mentanarcaféin*?
- Er hetta eitt stuttsøgusavn ella ein skaldsøga?

Í seinnu helvt av blokkinum skulu tit skipa tykkum í bólkar og byrja at arbeiða við uppgávunum niðanfyri.

© Nám 2023

## Greina og tulka (2-3 blokkar)

Bólkaarbeiði (2-3 í hvørjum bólki).[1] Hvør bólkur arbeiðir við eini av uppgávunum niðanfyri og leggur fram fyri flokkinum.[2]

### Uppgáva 1) Tann ungi drongurin

Greinið og tulkið partin “Tann ungi drongurin”. Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av tí unga dronginum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um tann unga drongin í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

### Uppgáva 2) Kvinnan í reyða regnfrakkanum

Greinið og tulkið partin “Kvinnan í reyða regnfrakkanum”. Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av kvinnuni í reyða regnfrakkanum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um kvinnuna í reyða regnfrakkanum í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

### Uppgáva 3) Maðurin við yvirskegginum

Greinið og tulkið partin “Maðurin við yvirskegginum”. Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av manninum við yvirskegginum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um mannin við yvirskegginum í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

### Uppgáva 4) Myrkhærda gentan

Greinið og tulkið partin “Myrkhærda gentan”. Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av myrkhærdu gentuni. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um myrkhærdu gentuna í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

[1] Um fáir næmingarnir eru í flokkinum, ber eisini til at arbeiða einsæris, ella at bólkarnir arbeiða við fleiri uppgávum.

[2] Bólkauppgávurnar eru rættiliga líkar. Skilagott er tí at lata framløgurnar fyri flokkinum bert fevna um partar av bólkaarbeiðinum, t.d. bara persónlýsingarnar.

© Nám 2023

**Uppgáva 5) Tann brúnoygdi**

Greinið og tulkið partin "Tann brúnoygdi". Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av tí brúnoygda. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um tann brúnoygda í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

**Uppgáva 6) Konan við blástrinum**

Greinið og tulkið partin "Konan við blástrinum". Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av konuni við blástrinum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um konuna við blástrinum í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

**Uppgáva 7) Kvinnan við barnavogninum**

Greinið og tulkið partin "Kvinnan við barnavogninum". Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av kvinnuni við barnavogninum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um kvinnuna við barnavogninum í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

**Uppgáva 8) Ungi maðurin við keppinum**

Greinið og tulkið partin "Ungi maðurin við keppinum". Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av unga manninum við keppinum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um unga mannin við keppinum í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

**Uppgáva 9) Gráhærdi maðurin**

Greinið og tulkið partin "Gráhærdi maðurin". Tit kunnu brúka greiningarfrymil sum hjálparamboð. Leggið í greiningini serliga dent á frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsing av gráhærda manninum. Í persónlýsingini skulu tit eisini taka tað við, sum stendur um gráhærda mannin í øðrum pørtum í bókini.

Í *Sýni & Dýpi 1* kunnu tit heinta greiningarfrymil og lesa meira um frásøgufólk, sjónarhorn og persónlýsingar. Greiningarfrymil er eisini tøkur á Snar.fo.

© Nám 2023

## Ymsar uppgávur (1-2 blokkar ella heimaarbeiði)

Ymsar uppgávur at arbeiða við einsæris ella í bólkum.

### Uppgáva 1) Tíggjunda søgan

Skriva tíggjundu søguna til bókina *Skuggamyndir* við hesum treytum:

- Høvuðspersónurin skal vera ein persónur í bussinum, t.d. bussførarin ella eitt ferðafólk í bussinum, sum tú sjálv/ur finnur uppá.
- Allir hinir níggju persónarnir í bókini skulu vera við.
- Frásøgufólkið skal siga frá í 3. persóni í tátíð.
- Søgan skal hava innara sjónarhorn, og lesarin skal uppliva hana gjøgnum eygu og hugsanir hjá høvuðspersóninum.

### Uppgáva 2) Sangtekstur

Á s. 66 kemur fram, at ungi maðurin við keppinum er byrjaður upp á ein sang um kvinnuna við barnavogninum: "Hon skuldi bara vitað. Lá sum hálvliðugt nótaark á loftskamari hansara."

Skriva tekstin til sangin hjá unga manninum við keppinum um kvinnuna við barnavogninum. Hav serliga ljóðmynd og skaldsligar myndir í huga, meðan tú skrivar. Les meira um skaldskap í bundnum máli í *Sýni & Dýpi 1*.

### Uppgáva 3) Ummæli

Skriva eitt ummæli av bókini *Skuggamyndir*. Les meira um ummæli í *Sýni & Dýpi 1*.

### Uppgáva 4) Leikframførslur

Gerið smáar leikframførslur av ymsum senum í bókini. Tit kunnu fáa íblástur úr verkstovuni "At framføra" úr *Sýni & Dýpi 1*.

© Nám 2023